gult2 cyan2 magenta2 svart2

Olofson fekk loyniboð í Barentshavið

Privatu telefaxini frá konuni vóru skrivað við grikskum bókstavum, so bara Peter O. K. Olofson kundi lesa tey, tá tey komu umborð á Ljósafelli. Fyrrverandi presturin hevur skrivað bók um fyrsta túrin til sjós

OLOFSON
Eyðun Klakstein

Peter O. K. Olofson tók til málsligar snildir, tá hann var til skips við Ljósafelli í fjør.

Hetta greiðir hann frá í nýggjari bók, sum hann hevur skrivað um sín fyrsta veruliga túr til sjós.

Telefonsamrøðurnar vóru fáar, tí tað kostar nógvar pengar at tosa umvegis fylgisvein, og tí høvdu Peter og konan samskifti umvegis telefaxið.

Men við faxum er tann trupulleiki, at tey kunnu koma í skeivar hendur, tá tey verða send umborð á ein trolara, og so er ringt at skriva persónlig brøv til hvør annan.

Men fyrrverandi presturin og kona hansara vóru ikki ráðaleys.

Óskiljandi brøv

Konan skrivaði brøvini til Olofson á donskum, men aftaná syrgdi teldan fyri, at bókstavirnir vórðu broyttir til grikskar bókstavir.

Síðani varð brævið sent í telefaxi umborð á Ljósafelli, og har kundi skiparin so bara staðfesta, at eitt ólesiligt bræv var komin til Olofson.Fyrrverandi presturin dugir grikska alfabetið, og tí fekk hann lisið brøvini uttan trupulleikar.

– Á hendan hátt kundu eg og konan hava privat samskifti. Tað bar til at verða meiri persónligur, enn um talan var um telefonsamrøður umvegis fylgisvein, skrivar Olofson í nýggju bók síni.

Okkara prestur

Bókin »Da dørene fik sko på« er júst komin út, og Peter O. K. Olofson hevur skrivað bókina sum eitt minni um ein túr til skips.

Olofson var við Ljósfelli á Flemish Cap og í Barentshavinum, og tað sæst í bókini, at hann hevur fylgt væl við í gongdini umborð á skipinum.



Peter O. K. Olofson hevur skrivað ein bók um, tá hann sum fyrrverandi prestur endaði umborð á einum føroyskum trolara

Hann greiðir frá arbeiðsgongdini, hendingum av ymsum slagi og um samveruna við føroysku sjómenninar. Hann dregur stundum sín kristnað boðskap uppí frágreiðingarnar, men sjálvt lívið umborð á Ljósafelli fyllir mest í bókini.

Olofson greiðir millum annað frá, at hann stundum varð umrøddur sum »prestur« umborð.

Tá hann var komin heim, lánti hann videoupptøkur hjá einum av manningini. Onkrar upptøkur er gjørdur úr bjargingarbáti hjá skipinum, og tá upptøkumaðurin einu ferðina tekur myndir av skipinum og Olofson kemur uppá, sigur hann: »Hatta er okkara prestur«...

Bókin nógv umrødd umborð

Tá Olofson kom umborð á Ljósfelli fór prátið beinanvegin at ganga um, at hann ætlaði sær at skriva eina bók um túrin. Tí mátti manningin vísa seg frá sínum bestu síðu.

Olofson hevði ikki ætlanir um at skriva slíka bók, hóast hann skrivaði dagbók á túrinum, men tað endaði hóast alt við, at hann vildi skriva nógv umrøddu bókina.

– Tað er menniskju, sum vit hava hitt, sum vit ongantíð síggja aftur, men tað er ikki avgerandi. Vit hava nøkur minni um hesi fólk, og hendan bókin kann so verða eitt minni um ein av teimum mongu túrunum hjá føroyskum skipum, sigur Peter O. K. Olofson um bókina.

Bókin kostar 100 krónur og fæst í bókahandlunum. Tað er OK-Forlagið, sum stendur fyri útgávuni.

NCC missir nógvar pengar

NCC missir stórar peningarupphæddir av verkfallinum. Arbeiðið at gera Vágatunnilin er steðgað, og verkfallið kann eisini fáa avleiðingar fyri møguligan Norðoyatunnil

TUNNLAR
Eyðun Klakstein

Arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin til Vágarnar liggur stilt í hesum døgum, og tað hevur við sær, at tíðarætlanin fyri arbeiðið er rokin.

– Vit vóru frammanfyri tíðarætlanina, áðrenn verkfallið byrjaði, men tað eru vit ikki longur, og tá vit sleppa í gongd aftur, eru vit komin afturúr, sigur Herman Lindberg, umsitingarleiðari hjá NCC í Føroyum.

– Hetta er ein sera óheppin støða, sum vit eru komin í. Vit vóru í fullari ferð, tá verkfallið kom, og tað fer at taka nógvar dagar eftir verkfallið, áðrenn vit fáa rættiliga ferð aftur á arbeiðið aftur, sigur hann.

Norðmenn sendir heim

NCC hevur havt 25 norðmenn til arbeiðis, umframt teir 35 føroysku arbeiðsmenninar, men allir hesir eru farnir heim.

Norðmenninir arbeiða í vaktum. Teir eru í Føroyum í fýra vikur og hava síðani frí í tvær vikur. Síðst í næstu viku skuldi vaktarskifti verða, men longu nú verða norðmenninir, sum hava verið til arbeiðis, sendir heim, og avloysararnir hava fingið boð um at bíða við at koma hendanvegin.

– Framdriftin í arbeiðnum steðgaði beinanvegin, tá verkfallið kom. Vit fingu loyvi at tryggja tunnilin, og síðani hava vit gjørt ymiskt umvælingararbeiði. Men nú er alt í besta standi, og tí er eingin orsøk at hava fólki til arbeiðis, sigur Herman Lindberg.

Ongantíð áður

Leigan av amboðunum, sum verða brúkt til at gera Vágatunnilin, kostar einar 150.000 krónur um dagin, og seinastu tvær vikurnar eru hesir pengar goldnir, uttan at amboðini hava verið í brúk.

– Leiðslan í Danmark og Noregi skilir einki av støðuni, tí teir hava ongantíð verið úti fyri slíkum áður. Tað er ótrúligt, at hetta verkfallið skal sleppa at draga út, tá tað kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri samfelagið, sigur Herman Lindberg.

– Vit missa sum er nógvar pengar, arbeiðsfólkið er tímaløn og missir eisini pengar, og so er tíðarætlanin hjá okkum rokin fyribils. Støðan er ótolandi, sigur umsitingarleiðarin hjá NCC í Føroyum.

– Vit hava ikki roknað eitt verkfall inn í okkara tilboð, men hetta er nakað, vit mugu hugsa um til eina aðru ferð. Skulu vit hava eitt drúgt verkfall annaðhvørt ár, so má tað eisini takast við í møgulig tilboð, sigur Herman Lindberg, umsitingarleiðari hjá NCC í Føroyum.

Mynd: Jens Kristian Vang

Dýrkar Norðoyatunnilin

NCC hevur bjóðað sær at gera Vágatunnilin fyri ein fastan prís, og tí eru tað teir, sum sita við Svartaperi, nú verkfallið leggur arbeiðið lamið.

– Vit hava ikki roknað eitt verkfall inn í okkara tilboð, men hetta er nakað, vit mugu hugsa um til eina aðru ferð. Skulu vit hava eitt drúgt verkfall annaðhvørt ár, so má tað eisini takast við í møgulig tilboð, sigur Herman Lindberg.

Ætlanin hevur verið, at arbeiðið at gera Norðoyatunnilin um Leirvíksfjørð skal byrja, tá Vágatunnilin er liðugur, og tí kann tað henda, at hetta arbeiðið fer at dýrka, tá tilboðini skulu taka hædd fyri einum ella tveimum drúgvum verkfallum.

– Eg haldi, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sum skjótast skulu finna saman til samráðingar aftur, so endi fæst á hesi støðuna. Hetta kunnu vit ikki liva við, sigur Herman Lindberg.

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Matiné í Havnar kirkju

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 26 mai kl. 11.30 verður aftur morgunkonsert í Havnar kirkju.

Hesaferð verður tað "Havnar Ungdómshornorkestur" undir leiðslu av Kenneth Jones, ið spælir.

Hetta orkestrið fer í summar ferð til Skotlands at halda konsert. Tey hava eisini ein minni bólk "Messingbólkurin" við fimm spælarum, og hesir fara eisini at spæla í kirkjuni. Skráin verður bæði gamal og nýggjur tónleikur, ið er hóskandi í kirkjuligum høpi.

Gospelkonsert í Nesvík

TÍÐINDASKRIV

Í samband við felagsmissiónsvikuna fyri Norðstreym og Eysturoy, verður skipa fyri ungdómstiltøkum fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Fríggjakvøldið 25. mai kl. 22.30 verður lovsangs- og vitniløta í Leguhúsinum í Nesvík við fuglfirðingum. Aftaná verður Café, har heitur matur verður til keyps.

Leygarkvøldið á hesi missiónsviku er vanligt at hava eina gospelkonsert, og soleiðis verður eisini í ár. Við á konsertini verða Magni Christiansen, Bisco, G-sus og eitt ungdómskór úr Vágunum. G-sus er ein nýggjur bólkur úr Fuglafirði, sum ongantíð hevur staðið á palli fyrr. Spennandi verður tí at finna útav, hvat teir hava at bjóða uppá. Afturat hesum verður eisini ein drama-framførsla. Konsertin byrjar kl. 22.30. Ókeypis atgongd.

Konsertfelagið

TÍÐINDASKRIV

Seinasta tiltak hjá Konsertfelagnum hendan veturin, verður við svensku saksofonkvartettini Rolling Phones.

Kvartettin heldur tvær konsertir á ferðini: í fimleikarhøllini í Glyvra skúla hósdagin -

Kristihimmalferðardag - 24. mai kl. 19:30, og í Listaskálanum sunnudagin 27. mai kl.16:00.

Harafturat spæla Rolling Phones fríggjakvøldið í Vestmanna í smb. við árligu kórstevnuna.

Rolling Phones er ein sermerktur og vælumtóktur bólkur í Svøríki, sum er kvinnuliga mannaður við Tove Nylund sopran-, Kristin Uglar alt-, Helena Ericsson tenor- og Neta Noren barytonsaksofon.

Skipað verður eisini fyri verkskeiði fyri saksofonnæmingar í musikkskúlanum, sum endar við eini konsert í Listaskálanum leygardagin 26 mai, kl 17:00.

Skráin hjá Rolling Phones er sett soleiðis saman at høvi er bæði at hoyra umskrivaðan virtuosiskan tónleik eftir t.d. Bach og so nýskrivaðan tónleik við myndum eftir Wahlberg.

Fólk kann vænta sær eitt heilt serligt upplivilsi, av hesum fýra toppprofessionellu svensku dámunum, við teirra glitrandi ljóðførum.